**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*





*Boys in a Band vóru síðsti bólkurin, ið framførdi, og fólk vóru so við uppá tað, at teir máttu upp aftur á pallin at spæla eykanummar. Tað bleiv til tokulagið »Baby Blue« í Elvis Prestley stíli.*
*Mynd: Olivier Donnet*

feløg vísa áhuga fyri teimum. M. a skulu teir 30. august spæla á einum av størstu festivalinum har, og skulu tá deilast um pall við eitt nú Babyshambles, Kate Nash og Mogwai. Ein annar stórur nordiskur showcase festivalur í Hollandi hevur eisini bookað Orca at spæla tann 25. oktober, umframt at kenda hollendska teaturið Maaspoort ætlar at fáa fingrarnar í teir.

Sum skilst á lagnum, eru festivalar eisini farnir at ringja eftir Budam, men har er einki endaliga staðfest enn.

## Helvtin imponeraði

- Eg helt, at Orca og Boys in a Band høvdu okkurt at bjóða uppá, men eg vil tó ikki siga, at eg ikki havi hoyrt tónleikin hjá teimum fyrr. Orca hevur bara nakað serligt yvir sær, sjálvt um eg ikki haldi bólkin vera so einstakan, sum onkur vil gera hann til. Og so hava Boys in a Band tveir ordiliga góðar sangir, sum er rættiliga positivt. Hinir báðir bólkarnir søgdu mær einki, legði Phillipe Decoster hart út við at fortelja mær, tá eg spurdi hann, hvat honum dámdi framførslurnar. Philippe umboðaði bæði stóra belgiska útgávufelagið 62TV Records og stóra belgiska distributiónsfelagið Bang. Tað er m.a hjá hesum felagnum, at belgiski bólkurin dEUS, sum nú er heimskendur og hevur selt meira enn eina millión fløgur kring heimin, gav út sína fyrstu fløgu. Bang breiðir út tónleik í eitt nú Belgia, Fraklandi, Bretlandi, Amerika og Japan.

Men hvat inntrykk hevur tú fingið av Føroyum og føroyska tónleikamarknaðinum? spurdi eg hann so.

- Tað veit eg ikki. Eg havi bara hoyrt fýra bólkar. Og eg haldi slett ikki, at tónleikur gongur út uppá, hvar hann kemur frá. Eg lurti eftir hvørjum sangi sær, og um eg finni ein sang, sum mær dámar onkrastaðni innímillum, kanni eg bólkin nærri. Eg helt ikki sum so, at eg hoyrdi nakað serføroyskt við bólkunum, sum framførdu á Atlantic Soundscapes. Eg haldi í grundini slett ikki, at eg hoyrdi nakað, sum eg ikki havi hoyrt fyrr. Men eg við tó siga, at Orca vóru mest áhugaverdi bólkurin, um eg skal hugsa í serstøkum, etniskum høpi.

- Tað kann eisini gera tað sama, hvar tónleikur kemur frá. Bara tónleikurin er góður. Sjálvt um mann ofta heldur, at t.d íslendskur tónleikur er ordiliga íslendskur, so er hann tað í grundini ikki. Tað er bara øgiliga lætt at definera tað sum verandi »íslendskt«, tá tú frammanundan kennir onkran bólk harfrá. Eingin bólkur er so serstakur, at hann kundi komið frá Mars. Og tað vóru hesir fýra føroysku heldur ikki.

## Síðani ravmagnið

- Her í Belgia er ei heldur nakar so ógvusliga serligur bólkur. Síðani ravmagn bleiv uppfunnið, er tónleikur allastaðni farin at ávirkast globalt, og alt ljóðar eitt sindur av øllum í dag. T.d Budam er blues í minum oyrum. Tú ánar ikki, hvar bólkurin kemur frá, fyrr enn onkur sigur tær tað. Tað er heldur ikki Budam, sum hevur uppfunnið slagið, men tað er bara teirra útgava av tónleikinum. Boys in a Band eru ræðuliga kul, men tað er eisini bara garasjurokkur, og tú veist heldur ikki, hvar teir koma frá, fyrr enn tú fært tað at vita.

- Sum sagt haldi eg heldur ikki, at tað hevur nakað at siga, so leingi tónleikurin kemur frá hjartanum. Og tað vóni eg, at hann ger hjá hesum fýra bólkunum, sigur Phillipe avgjørdur at enda.

Tá eg tosaði við Phillipe, hevði hann enn ikki kannað við baklandinum hjá sær, um teir skuldu signera nakran bólk, men nú er komið í ljós, at distribusjónsfelagið Bang hevur tikið Orca til sín.

## Ymsar men væl nøgdar meiningar

Aftursvarið frá teimum ymsu umboðunum fyri tónleik og politik, ið luttóku á Atlantic Soundscapes, var ógvuliga varierandi. Summi vóru meira ovfarin enn onnur, men sum heild vóru øll væl nøgd við tiltakið og høvdu fingið okkurt burturúr.

- Tað riggaði hjá okkum at fáa hetta blást upp í pressuni, at fáa vakt ans fyri tiltakinum og føroyskari mentan. Vit gjørdu tað rætt, sikkurt tí at vit hava tikið tað í álvara. Tað hevur ávirkað tey, ið vit hava tosað við, soleiðis at tey eisini hava tikið tað í álvara, og á tann hátt hevur umtala og forvitni uttanifrá bara vundið uppá seg ígjøgnum síðsta mánaðin, greiðir Christian Hald Buhl, ein av fyriskiparunum frá føroysku sendistovuni í Brussel, væl nøgdur frá.

- Vit fóru frá at hava 40 til at hava 100 bransjufólk á gestalistanum, og tað er ein gigantisk hækking. Vit hava eisini fingið fatur á teimum røttu fólkunum í tónleikavinnuni; frá ordiliga stórum feløgum, sum viga tungt og hava heimskend nøvn undir veingjunum hjá sær. Tað er stutt sagt fantastiskt, at vit hava klárað at savna so nógv týdningarmikil fólk saman. Vit hava fingið nógv ynskir uppfylt, og tað verður spennandi at síggja úrslitið um nakrar vikur, tá allar avtalur fara at vera komnar í hús, og vit ordiliga kunnu taka samanum tað, ið er hent. Higartil eri eg í øllum førum væl nøgdur og kann ikki annað enn gleðast um, hvussu tiltakið er eydnast.

## Uppdatering fylgir

Vit fylgja við og prenta tað her í blaðnum so hvørt sum fleiri úrslit av Atlantic Soundscapes koma í ljós. Inntil víðari kanst tú lesa meira um tað á myspace. com/atlanticsoundscapes.



*Orca hava longu fingið fleiri avtalur í lag við bookingfeløg, distributiónsfeløg og festivalar í Belgia, Hollandi og Fraklandi.*
*Mynd: Olivier Donnet*



*Orca var tann bólkurin, sum kanska ikki heilt uttan grund imponeraði áhoyrararnar mest við teimum løgnu og hugtakandi ljóðunum og ljóðførunum.*
*Mynd: Olivier Donnet*



*Magnus Piano Johannessen.*
*Mynd: Olivier Donnet*